# mær

## Ikki fyrstu ferð

Ógvusligi brotasjógvurin umborð á Fríðborg er ikki fyrsti brotasjógvurin hjá Páll Johan sum skipara.

Fyri seks árum síðani sigldi hann við Sólborg og var komin heim av túri. Hann fór tá ein túr sum skipari við Trasti, tí teir manglaðu ein avloysara.

28. januar 2001 fekk skipið ein brotasjógv í ringum veðri.

Trastur var tá staddur millum Sandoyarbanka og Suðuroyarbanka í slíkum roki, at illa sást fram um stavn.

Hesin brotasjógvurin rakti, eins og hesin seinasti, brúnna, har øll tann nautiska útgerðin fór.

-Har gjørdist ikki annað enn at sleipa okkum inn aftur til lands, sigur Páll Johan.

# *Sonurin:* – Eg fari aftur til skips



*- Eg var eitt sindur bangin, sigur Kenneth Bærentsen (vinstrumegin á myndini), og sum var á triðja túrinum við Fríðborg*

**- Um tað tekur ov langa tíð at umvæla skipið, so fari eg bara við onkrum øðrum báti ímeðan, sigur 16 ára gamli dekkarin, Kenneth Bærentsen. Í fleiri døgn hevði hann ikki samband við familjuna heima í Føroyum, meðan Fríðborg var stødd í vandasjógvi**

BJARGAÐUR
*Snorri Brend*

Hetta er triði túrurin hjá Kennethi umborð á Fríðborg.

Hann hevði neyvan væntað at hesin skuldi fáa ein slíkan enda, tá ein brotasjógvur brádliga broytti alt umborð.

Kenneth sat júst tá í messuni, tá onkur rópti at ein rútur var brostin inn uppi á brúnni.

- Tað kom faktiskt sum eitt sjokk fyri meg, greiðir hann frá.

Teir lupu frá borðinum og kundu tá bert staðfesta, at nógvur sjógvur rann niður frá brúnni og inn í kømrini.

- Tá skilti eg, at tað var alvorligt!, sigur Kenneth.

### Eitt sindur bangin

Hann byrjaði beinanvegin at hjálpa til við at oysa sjógvin fyri borð aftur.

Men hetta var lættari sagt enn gjørt:

- Tað var faktiskt sjógvur allastaðni. Tað kom púra óvart á meg.

- Og skal eg vera heilt erligur, so bleiv eg eitt lítið sindur bangin. Eg havi jú aldrin roynt slíkt fyrr, sigur Kenneth, sum hevur verið umborð á Fríðborg í fýra mánaðir.

Hesa løtuna fóru nógvir tankar gjøgnum høvdið á tí unga Kennethi: "Hvat hendir nú?", "Hvat skal eg gera?", "Hvussu skulu vit gera?", "Hvør bestemmar?" - og kanska eisini "Koma vit heilskapaðir burtur úr hesum?"

### Alarmarnir bibbaðu

Tað gekk tó ein góð - kanska ein alt ov long - løta, til teir fingu fulla greiðu á støðuni á brúnni og umborð annars.

Har stóð kanska ikki alt ov væl til beint tá:

- Uppi á brúnni var ein øgiligur gangur og nógv ljóð. Allir alarmarnir stóðu og bibbaðu.

- Men ein tíma aftaná byrjaðu vit at slappa av aftur, greiðir Kenneth frá.

Samstundis við hetta arbeiddu teir á brúnni at fáa tey nautisku tólini at virka aftur. So líðandi eydnaðist hetta, soleiðis at teir kundu byrja heimferðina, væl fyrri enn ætlað.

### Ikki skrekk

Fyri tann unga sjómannin var hetta ein serstøk og ikki sørt ógvuslig hending.

- Hetta var ræðuligt. Eg fekk ikki sovið, men gekk bert uppi allatíðina fyri at vita, hvussu gekst við arbeiðinum.

- Tíbetur endaði alt gott, sigur Kenneth, sum kortini ætlar sær til skips aftur so skjótt sum tilber.

- Eg var eitt sindur bangin, men eg havi kortini ikki fingið skrekk fyri sjólívinum.

# *Pápin:* – Gott at fáa sonin aftur



**- Tað følist ótrúliga gott at sonurin og teir allir eru komnir aftur í øllum góðum, sigur Antines Poulsen av Kambsdali.**

AVVARÐANDI
*Snorri Brend*



*Familjan hjá Kennethi var komin til Runavíkar at taka ímóti einum soni og mammubeiggja*

- Vit fingu boðini um óhappið um hálvgum ellivu-tíðina mikukvøldið. Tá vóru gingnir einir tveir tímar, síðani teir fingu sjógvin, greiðir Antines frá.

Hann var komin oman á havnalagið fyri at taka ímóti einum av hansara kæru umborð, tí 16 ára gamla Ken Bærentsen.

Hóast veðrið var ófantaligt í gjár, var eingin ivi um ta gleðina sum lýsti út av andliti hansara, nú Fríðborg kom aftur í øllum góðum.

Antines mátti tó bíða eina løtu til hann sá Ken aftur. Manningin skuldi rigga skipið av fyrst, men tá teir so møttust aftur á brúnni var gleðin stór.

- Ja, tað var gott at fáa hann aftur, sigur Antines.

Tað eru sjálvandi altíð boð við ófrættadámi, tá tað frættist um eitt skip sum kemur út fyri slíkum.

Tey har heima fingu sum nevnt fyrstu boðini eina tveir tímar eftir óhappið, men so gekk heldur long tíð, til tey frættu aftur.

Fyrstu tíðindini søgdu, at eitt annað skip hjá reiðarí'inum "Havborg" skuldi koma til teirra 12 tímar seinni.

- Men tað gekk so eitt heilt samdøgur. Og tú kanst líka trúgva, at hesir 24 tímarnir gingu ótrúliga seint.

- Vit gingu bara runt go gjørdu okkum okkara tankar um tað sum var hent. Og tankin um ta ringasta, sum henda kundi, kom eisini framvið.

- Tað hevur ein altíð lyndi til, sigur Antines sum sjálvur hevur roynt sjólívið.

Tíbetur gekst tað ikki so: Tey fingu at vita, at tað stóð væl til við manning og skipi.

- Allíkavæl tóktist tað vera drúgt at bíða, sigur hann.